El&tele eisini við bíligum breiðbandi

BREIÐBAND

- Sum ein liður í okkara støðugu stremban eftir at veita kappingarførar tænastur á øllum teimum økjum, el&tele veitir tænastur á. (el-tele og internet), eru vit nú komnir við nýggjum breiðbandstilboðum til privatkundarnar, sigur Rasmus Magnussen, stjóri í el&tele í tíðindaskrivi.

- Vit hava lagt dent á at hava teir bestu prísinar til tey, sum hava eina skynsama internetnýtslu, sigur hann.

Í internetpakkunum frá el&tele eru stórar mongdir av fríari ferðslu, og so verður tað ókeypis hjá teimum størru pakkunum at verða á netinum frá leygardegi kl 14 til mánamorgun kl 06.

Tann minsti pakkin kostar 195 kr um mánaðin við 275 MB fríari ferðslu og tann størsti kostar 575 kr við 5000 MB fríari ferðslu.

Nærri fæst at vita á www.eltele.fo

- Breiðbandstænastan hjá el&tele eitur ET-Net, og veita vit tænastur í Tórshavn og pørtum av Skálafjørðinum, sigur Rasmussen.

Fyrilestur um giktsjúkur

Í vetur hevur Giktafelag Føroyatvey tiltøk á skránni. Tann 22. september kl 19 verður skipað fyri einum fyrilestri við danska serlæknanum Karsten Asmussen. Fyrilesturin verður í MBF húsinum á Ìslandsvegi 10c. Hann fer at greiða frá ymsum giktsjúkum og viðgerðarhættum. Felagið vónar, at nógvir limir møta til hetta tiltak.

Tað næsta verður árligi vikuskiftistúrurin hjá felagnum. Vikuskiftið 15. og 16 oktober verður skipað fyri árliga túrinum, har limir í Giktafelagnum møtast til gamans og álvara. Vikuskiftið byrjar leygardagin 15. oktober kl. 11, tá øll møta á Gjáargarði. À skránni henda dagin eru smáir fyrilestrar um alternativa viðgerð, og um viðgerðarmøguleikan í Føroyum. Um kvøldið verður døguriði, undirhald og felagssangur.

Sunnudagin 16. oktober verður Turkalands túrurin umrøddur og eftirmettur.

Limir í Giktafelagnum gjørdu á páskum ein túr saman til Turkalands, har tey keyptu sær eitt viðgerðaruppihald á kenda viðgerðarstaðnum Balcova.

Hetta høvið er gott at eftirmeta um nyttuna av viðgerðini, og um hetta skal endurtakast aftur eina aðru ferð.

– Eg vil liva lívið

Fríggjakvøldið skipar felagið »Náttarravnarnir í Tórshavnar Kommunu« fyri fundi í læraraskúlahøllini undir heitinum »Eg vil liva lívið«. Endamálið við fundinum er at fáa orðaskifti í lag um ungdóm og rúsevni

UNGDÓMUR OG RÚSEVNI

Við á fundinum verður m.a. Lene Risberg, fyrrverandi rúsevnamisnýtari úr Danmark. Hon greiðir frá egnum royndum sum rúsevnamisnýtari, og hvørjar avleiðingar tað hevur havt fyri hana – eitt nú tað, at hon ikki kann fáa børn.

Tey ungu vilja út at liva lívið.

Lene Risberg, fyrrverandi rúsevnamisnýtari úr Danmark, greiðir frá egnum royndum sum rúsevnamisnýtari

Er nakað nýtt ella skeivt í tí?

Nei, sjálvandi ikki. Soleiðis hevur tað altíð verið. Tey ungu hava áræði. Tey vilja slíta seg leys, gera sínar egnu royndir, royna alt, flyta mørk. Tey seta seg ikki niður at grunda um, hvøjar avleiðingar hetta ella hatta møguliga kann hava.

Soleiðis hevur ungdómurin altíð verið, og soleiðis eigur tað at vera.

Vit »gomlu« hava kanska lyndi til at stúra ov nógv.

Vit hoyra, at nú er nógv ecstasy og onnur rúsevnasløg í landinum

... at ung heilt niður í 12 ára aldur ganga og mala full úti um náttina

... at so gott sum hvørja ferð dansur er fyri tey ungu, má eitt ella fleiri koyrast á sjúkrahús til útpumpingar.

Er tað løgið, at nógv foreldur eru rødd?

Vit vilja hava okkara ungu livandi heimaftur, tá tey hava verið úti.

Hvat skulu ella kunnu vit gera?

Summi lata bara eyguni væl aftur og krossa bara fingrar fyri at einki skal henda, og tað kann jú heldur ikki vera rætt.

Nei, vit skulu hava eyguni opin og fylgja við í, hvussu tey ungu hava tað, og saman skulu vit royna at gera umhvørvið trygt.

Fríggjakvøldið 23 sept kl. 19.00 skipar felagið »Náttarravnarnir í Tórshavnar Kommunu« fyri áhugaverdum fundi í læraraskúlahøllini undir heitinum »Eg vil liva lívið«.

Endamálið við fundinum er at fáa orðaskifti í lag um ungdóm og rúsevni.

Við á fundinum verður millum onnur Lene Risberg, fyrrverðandi rúsevnamisnýtari úr Danmark, sum er ein royndur fyrilestrahaldari. Hon greiðir frá egnum royndum sum rúsevnamisnýtari, og hvørjar avleiðingar tað hevur havt fyri hana.

Millum annað at hon ikki kann fáa børn.

Luttakandi á fundinum eru:
Umboð fyri Tórshavnar Kommunu
Erik Thorsted stjóri fyri náttarravna landssekretariatinum í Danmark
Lene Risberg (Stuðlað av Føroya Sparikassa) fyrrverandi rúsevnamisnýtari www.risberg.dk
Umboð fyri Løgregluna
Hans P. Strøm Landsstýrismaður í almanna og heilsumálum

Sjálvandi skulu tey ungu út at royna flogið.

Men vit skulu royna at tryggja, at tey koma heimaftur. Klókari, sterkari, meira ment og búgvin og fyrst og fremst livandi.

Hevur hetta tín áhuga og/ella hevur tú okkurt gott hugskot, so hittast vit í Læraraskúlahøllini 23 sept. Kl. 19.00.

Lene misnýtti ecstasy

Líka so lítið, sum læknarnir vita um evnið ecstasy otg tað, sum verður latið í tað lika so lítiið vita teir, hvørjar skaðar, tað elvir til í heilanum og restina av kroppinum, sigur Lene Risberg, fyrrverandi ecstasy-misnýtari

MISNÝTSLA

– Summarið 2000 varð eg spurd, um eg vildi halda fyrilestrar um ecstasy og onnur líka skaðaelvandi evni við støði í mínum egnu royndum, og tað játtaði eg, sigur Lene Risbjerg, fyrrverandi evnismisnýtari.

Fimm ár eru nú liðin, og áhoyrararnir hava nú verið meir enn 150.000 ung fólk, foreldur, og ikki minst folk, sum dagliga arbeiða millum ung.

– Eg fortelji um mínar upplivingar í og aftan á ecstasymisnýtluna, mínar fyrstu upplivingar við evnunum, og teir næstu 12 mánaðirnar, meðan eg so við og við gjørdist verri og verri fyri, uttan at eg visti hví, til eg brádliga ein dagin stóð á 16. hædd og ætlaði at gera enda á mær...



Og so alla søguna um, hvussu misnýtslan ógvusliga broytti tey næstu 10 árini av lívi mínum - og framhaldandi fer at merkja restina av lívinum. Tí líka so lítið læknarnir vita um evnið ecstasy og tað, sum verður latið í tað, líka so lítið vita teir, hvørjar skaðar, tað elvir til í heilanum og restini av kroppinum, sigur Lene Risberg. Meira fæst at vita um hana og misnýtsluna á www.risberg.dk

Besta fløga í ár: Kaj Klein

Kaj Klein hevur givið út fløgu við føroyskum slagarum, sum hann hevur sett út av nýggjum. Úrslitið er einastandandi

FLØGUUMMÆLI

Meinhard Jensen

Síðan Tutl góvust við plátuhandlinum, hevur saknur verið í einum handli við tónleikaligum gullgrevstri, far from the madding crowd. Men handlarnir, sum eru, hava altíð okkurt forvitnisligt. Tað var, meðan eg vitaði, hvat tey hava av etniskum tónleiki hjá HCW Tórgarð, at eg bara hálgvum gav mær far um tann góða tónleikin, tey høvdu frá. Eftir eini fimm løg, vaknaði eg úr svøvni. So gott føroyskt hevði eg ikki hoyrt leingi. Tey fortaldu mær, at tað var Kaj Klein, sum sang. Fløgan æt "Hálvt frá hálsi" og vísti seg at vera spildurnýggj.

Mangur tónleikaáhugaður í Føroyum man javnan spyrja, hvat gerast kann við tónleikastøðuna hjá Útvarpi Føroya og fjølmiðlum annars. Fløgan hjá Kaj Klein minnir okkum á, at í smala høvuðsrákinum rekast stórir sangir, tey bestu løgini, meistaraverkini í føroyskum tónleiki. Men tað er langt ímillum, at tað rínir við. Sangirnir hava brúk fyri nýggjum klangi, upptøkum, kenslum, tankum, upplivingum, søgum og øllum tí nýggja, sum kann bjarga einum sangi frá deyðanum.

Og tað hevur Kaj Klein gjørt. Ikki púra einsamallur, tí hann hevur fólk afturat sær, men tað er hansara fløga. Hann hevði tó ikki maktað uppgávuna uttan tónleikarar, sum vita, hvat teir gera. Tað gera hesir. Og teir svinga, og tað ljóðar væl. Ljóðblandið er lýtaleyst.

"Tú og eg á ástartingi," "Eg siti so eina," "Rasmus," "Eitt sunnukvøld í plantasjuni" og "Gullkálvavalsurin" eita sangirnir m.a.

Útsetingarnar eru í slekt. Okkurt er meira rokk, annað meira blues. Tónleikurin er eitt slag av norðurlendskum vísutónleiki. Ljóðførini eru trummur, bass, gittar og hammond umframt mandolin, saxofon og trompet á onkrum løgum, og so eru góðar bakgrundsrøddir.

Sangurin hjá Kaj Klein er skyldur við Leonard Cohen og Nick Cave og serliga Tom Waits. Tað er tó ikki herm og riggar væl. Tað kann vera freistandi at hugsa sær ein bodegadám í løgunum, men tað haldi eg ikki er rætt. Tað rætta er at síggja støðuna, sum sangurin lýsir. Tá kann sangurin fáa ein nýggjan høvuðspersón, sum vit ikki eru von við. Tað er ikki Kaj Klein sjálvur, haldi eg, men tann syngjandi menskan, sum "reið sær avstað til

Texas bý." Hann er tann, sum "aftan fyri tey lá eitt sunnukvøld í plantasjuni." Sangirnir fáa spildurnýggjar dimensjónir, tí tað fjákuta kann gerast óhugnaligt, meðan tað lættsinta kann gerast sera álvarsamt.

Ironiin í "So langt eg kann minnast" fær eisini annað ljóð. Tað ljóðar ikki bara sum spei. Sangurin er um Satan, sum fór út úr hjartanum, tá Mammon flutti inn. Hann er ein parodi av einum sálmi, men tað er ikki gott at vita, hvør adressan er í dag. Hon kann vera tey, sum sungu hendan sangin fyri tretivu árum síðan. Hvussu er og ikki, so verður hesin sangurin, sum summi fara at leypa um, tí hann hevur ikki tann friðin yvir sær, sum hinir hava.

"Rasmus" er tað lagið, sum minst hendir við, meðan "Eg siti so eina" gerst ein heilt onnur søga. Hvussu er hesin endaður í Texas? Er hetta ein dráps-vísa ella er longsulin púra reinur? Sama kann sigast um "Eitt sunnukvøld í plantasjuni." Hvat ger ein maður við sovorðnari rødd í plantasjuni sunnukvøld?

Ætlanin við fløguni man vera at gera góðar upptøkur av góðum sangum. Øll løgini eru landaplágur, og tað er eitt genialt konsept. Onki hevur so nógv brúk fyri einum avsmurningi sum ein landaplága. Og onki er so býtt sum at skriva egin løg, tá so nógv onnur løg hava so nógv betur uppiborið at verða spæld.

Tónleikararnir eru danir fyri tað mesta, eftir nøvnunum at døma. Tað er gott, tí at roknast kann við, at teir kenna ikki so væl upprunaupptøkurnar. Úrslitið er ein fløga, sum verður ring at taka.